UTTAN ÚR HEIMI

## Alt fleiri fáa krabbamein

Nýggj tøl hjá danska heilsustýrinum vísa, at talið á krabbameinstilburðum økist, sjálvt um myndugleikar og felagsskapir royna at basa sjúkuni. Í 2001 vórðu 32.800 nýggir tilburðir av krabbameini staðfestir í Danmark, og í 2003 var talið 34.144, 16.637 menn og 17.507 kvinnur.

Í Kræftens Bekæmpelse halda tey, at, at ov lítið verður gjørt fyri at fyribyrgja nýggjum krabbameinstilburðum. Hans Storm, yvirlækni, sigur við Jyllands-Postin, at úrslitið av tí áhaldandi stríðnum ímóti royking sæst nú. Hann leggur afturat, at danir hava ongantíð roykt so lítið sum nú, men úrslitið av tí fer ikki at síggjast fyrr enn um eini 10 ella 15 ár, sigur hann.

-Vit hava serliga lagt dent á at viðgera fólk fyri krabbamein, men tað ræður um at leggja størri dent á tað fyribyrgjandi arbeiðið. Sum er verður ov lítið gjørt á tí økinum, sigur Hans Storm, sum sigur seg vóna, at meiri verður gjørt við tað fyribyrgjandi arbeiðið, nú kommunurnar yvirtaka ta uppgávuna í næstum. Sjálvur heldur yvirlæknin, at størri dentur skal leggjast á at fáa fólk at røra seg meiri og at eta betri mat.

## Ákærdur fyri landasvik

Myndugleikarnir í Uganda hava handtikið andstøðuileiðaran Kizza Besigye og ákært hann fyri landasvik og neyðtøku. Tíðindini um handtøkuna fingu fleiri túsund andstøðufólk út á gøtuna í teimum stóru býunum, men løgreglan spjaddi mótmælisfólkini við táragassi.

Sambært myndugleikunum vistu andstøðuleiðarin og 22 av stuðlum hansara, at ætlanir vóru um at koyra stjórnina frá, men teir søgdu einki. Harafturat hava myndugleikarnir ákært Kizza Besigye fyri at hava neyðtikið eina unga kvinnu í høvuðsstaðnum Kampala fyri átta árum síðani.

Í Uganda halda mong, at handtøkan er politisk. Fyri fyrstu ferð í 19 ár verður veruligt forsetaval í Uganda um stutta tíð, og alt bendir á, at Kizza Besigye er tann einasti, sum kundi bjóða Yoweri Museveni, forseta av. Besigye hevur búð í Suðurafrika tey seinastu fimm árini, men kom heim fyri trimum vikum síðani eftir áheitan frá andstøðuni, so hann kundi stilla upp til forsetavalið. Ein talsmaður hjá tí størsta andstøðuflokkinum sigur við Reuter, at Besigye er tikin, tí hann hevur fingið stóra undirtøku, síðani hann kom heimaftur.

## Nú kemur brúgvin

Í fleiri ár hava danir og týskarar tosað um møguleikarnar fyri at byggja eina brúgv tvørtur um Femarn-sundið ímillum Lolland og Týskland, men higartil er einki komið burtur úr tosinum.

Nú eru kortini útlit til, at okkurt fer at henda, tí tann nýggja stjórnin í Týsklandi hevur sett brúgvasambandið í samgonguskjalið, skrivar Politiken. Brúgvin verður einar 20 kilometrar long, og ætlanin er, at Danmark og Týskland skulu rinda hvørt sína helvt av kostnaðinum.

Danski samferðslumálaráðharrin, Flemming Hansen, er sera fegin um, at Femarn-brúgvin er komin á dagsskránna í Týsklandi. Hann sigur, at gongst eftir ætlan, kunnu londini skriva undir ein sáttmála um arbeiðið longu í januar, og at brúgvin verður liðug í 2015 ella í 2016. Danska vinnulívið fegnast eisini um týsku argerðina, tí sambandið fer at fáa stóran týdning fyri flutningin ímillum Danmark og Norðurevropa.

## Nýnazistar í rættinum

Týska ákæruvaldið hevur ákært 16 fólk fyri at hava havt ætlanir um at skipa ein felagsskap, hvørs endamál skuldi vera at skipa Týskland sum eitt nazistiskt ríki og at reka allar útlendingar av landinum.

Tey 16, sum eru í aldrinum 17 til 48 ár, komu fyri rættin í Koblenz fyrradagin. 14 teirra eru eisini ákærd fyri ófrið, tí tey gjørdu seg inn á limir í einum vinstrasinnaðum felagsskapi undir einari konsert í januar.

Sambært ákæruritinum eru øll 16 ákærd fyri eldáseting, harðskap og fyri at hava brúkt ólóglig nazi-tekin. Tað ljóðar eisini, at løgreglan fann spreingievni heima hjá onkrum teirra, skrivar AP.

# Sonur Sharon kann fáa sjey ára fongsul



*Omri og Ariel Sharon*

**Omri Sharon viðgongur seg sekan í sviki og følskum vitnisburði.**

ÍSRAEL
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Ísraelska ákæruvaldið hevur skuldsett Omri Sharon fyri at hava útvegað ólógligar pengar til valstríðið hjá pápanum upp undir tjóðartingsvalið í 1999. Undir avhoyringum hjá løgregluni hevur hann víst skuldsetingini aftur, men í gjár viðgekk hann, at hann hevði sagt ósatt undir avhoyringunum, og at hann er sekur í sviki.

Omri Sharon er tinglimur, men verður hann funnin sekur, noyðist hann at siga tingsessin frá sær, og harafturat kann hann fáa sjey ára fongsul.

Ísraelska ákæruvaldið vil vera við, at ein fyritøka, sum Omri Sharon stóð á odda fyri, fekk 1,3 millión dollarar frá fyritøkum í Ísrael og uttanlands, og at pengarnir síðani vórðu fluttir í kassan hjá Likud-flokkinum hjá Ariel Sharon.

Forsætisráðharrin hevur eisini verið til avhoyringar í málinum, men hann nhevur alla tíðina hildið uppá, at hann visti ikki, at flokkurin hevði fingið pengar ígjøgnum fyritøkuna hjá soninum, ella at flokkurin hevði fingið ólógligan stuðul til valstríðið í 1999.

# Oljurpísurin fær ikki ávirkan á framleiðsluna

**OPEC-londini ætla sær ikki at skerja oljuframleiðsluna, sjálvt um prísurin er fallin**

OLJA
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Oljuprísurin á altjóða marknaðinum er fallin rættiliga nógv í seinastuni, og gjáramorgunin kostaði ein tunna 55,35 dollarar á International Petroleum Exchange.

Men prísfallið fær ikki útflytaralondini í OPEC-felagsskapinum at skerja framleiðsluna. Formaðurin í felagsskapinum, Ahmad Fahd al-Sabah, sum er oljumálaráðharri í Kuwait, vísti í gjár aftur gitingum um, at londini fara at skerja framleiðsluna fyri at tálma prísfallinum.

- Nei, sum er hava vit ongar ætlanir um tað, segði hann sambært TDN Finans.

# Framgongd í Týsklandi

Júst sum teir báðir stóru flokkarnir í Týsklandi hava sett sær fyri at endurreisa landsins búskap, vísa nýggj tøl, at tað gongur tann rætta vegin í búskapinum.

Ein kanning, sum tíðarritið Bloomberg hevur gjørt, vísir, at búskaparvøksturin í Týsklandi var 0,6 prosent í juli-ársfjórðingi. Tað er meiri, enn búskaparfrøðingar høvdu roknað við og nógv meiri enn í apríl-ársfjórðingi, tá vøksturin var 0,2 prosent.

Tað er serliga útflutningurin, sum hevur havt góða ávirkan á búskapin, tí eftirspurningurin eftir týskum vørum er vaksin í Asia og Eysturevropa. Harafturímóti er nýtslan í sjálvum Týsklandi framvegis lítil, og tað kemst fyrst og fremst av, at ov nógv fólk eru arbeiðsleys og tí ikki hava ráð til størri nýtslu enn tað mest neyðuga, sigur Bloomberg.